# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Tey bestu verða kosin







*Tað verður ein av hesum trimum, sum fær heitið sum besti spælarin í Formula-kappingini í 2007*

**Í beinleiðis sending úr Miðlahúsinum í morgin verða bestu fótbóltsspælararnir í landinum kosnir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

At Amed Davy Sylla og Malena Josephsen gjørdust bestu málskjúttar í nú farna kappingarárinum, er ikki tað heilt stóra loyndarmálið. Og sum siður er, so verða tey eisini heiðrað fyri hetta, tá tey fáa gylta skógvin frá Thomas Dam Ítrótti.

Hinvegin er enn ikki greitt, hvørji skulu fáa heiðurin sum bestu fótbóltsfólkini á árinum. Atkvøðugreiðsla hevur verið millum liðformenn og venjarar, eins og fjølmiðlafólk hava sagt sína hugsan, og úrslitið av hesum verður almannakunngjørt í Miðlahúsinum í Vágsbotni fríggjadagin.

## Meistararnir í fokus

Ikki óvæntað, so eru tað tey bæði meistaraliðini – NSÍ hjá monnum og KÍ hjá kvinnum – sum eiga flestu spælararnar millum tey fremstu. Aðra staðni á síðuni síggjast tey trý fremstu í ymsu atkvøðugreiðslunum.

Hartil verður serstøk virðisløn eisini latin til liðið, sum í árinum hevur spælt besta fótbóltin í Formuladeildini. Hetta er virðisløn, sum verður latin av Thomas Dam Ítrótti og Sosialinum. Grundarlagið undir hesum eru bóltarnir, sum ítróttarskrivararnir hjá Sosialinum eftir hvønn dystin hava givið ymsu liðunum.

Tað liðið, sum hevur fingið flestu bóltarnar gjøgnum alt kappingarárið, fær sum vinning eitt sett av fótbóltum. Hesir bóltar skulu gevast til eitt av yngru liðum felagsins, og verða bóltarnir tá lætnir beinleiðis til spælararnar á hesum liði.

## Tey fremstu

Á yvirlitinum niðanfyri síggjast nøvnini á teimum, sum hava fingið flestu atkvøðurnar í atkvøðugreiðsluni. Yvirlitið er sett upp í stavrað, og sigur soleiðis einki um, hvussu raðfylgjan er hjá teimum fremstu.

**Ársins venjari**
**Kvinnur**
Alexander Djordjevic
Allan Dybzak
Magni Jarnskor

**Menn**
Eli Hentze
Piotr Krakowski
Jóhan Nielsen

**Ársins málverji**
Kvinnur
Mildrid Djurhuus
Randi Wardum

**Menn**
Jens Martin Knudsen
Jákup Mikkelsen
René Tórgarð

**Ársins stjørnuskot**
**Kvinnur**
Doris í Garði Joensen
Rósa Magnussen
Heidi Sevdal

**Menn**
Einar Hansen
Kristoffur Jakobsen
Bogi Løkin

**Ársins spælari**
**Kvinnur**
Rannvá Andreasen
Malena Josephsen
Heidi Sevdal

**Menn**
Fróði Benjaminsen
Óli Hansen
Nenad Stankovic

**Ársins dómari**
Lars Müller
Eiler Rasmussen
Petur Reinert

# Eisini føroyskt í B36

**Tað verður Heðin Askham, ið skal venja B36. Hetta stóð greitt í gjár, tá partarnir undirskrivaðu sáttmála**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við setanini hjá B36 av Heðini er tað nú bert GÍ av Formula-liðunum, sum ikki hevur sett venjara fyri komandi kappingarár. Og tað er merkisvert, at talan higar til einvíst hevur verið um føroyskar loysnir í ymsu feløgunum.

Heðin hevur ikki staðið á odda fyri liði í fremstu deildini áður, men hann hevur lokið hægstu føroysku venjaraútbúgvingina, og í fleiri ár hevur hann verið partur av arbeiðinum kring yngru landsliðini.

## Ungur hópur

B36 hevur nógvu seinnu árini verið eitt av feløgunum, sum støðugt hava meddað móti oddinum. Og í felagnum verður staðfest, at hetta eisini er málið í ár.

Tað eru tó fleiri, ið hava sett spurnartekin við, um missurin av fleiri profilum ikki er ov dyggur smeitur fyri felagið í hesum royndum. Burtur eru Jákup Mikkelsen, Fróði Benjaminsen og Amed Davy Sylla, og tað eru ikki spælarar, sum tú uttan víðari finnur avloysarar fyri.

Tað hevur tó verið greitt eina tíð, at Dmitri Jankovic, sum í ár spældi við VB/Sumba, skal styrkja um B36-verjuna í ár. Hartil skrivar felagið á heimasíðu sínari, at nýggjur málverji er ávegis til felagið, eins og arbeitt verður við at styrkja álopspartin.

Men ásannað verður tó, at talan í nógvar mátar verður um ein hóp, sum verður munandi yngri, enn hann var tað í ár, staðfestir Kristjan á Neystabø fyri heimasíðuni hjá B36.